# Rasmus var tann stinnasti

**Manningin á Rasmus Effersøe vann fótbóltskappingina fyri sjómenn í Suðuroynni leygardagin**

SOSIALT TILTAK
*Áki Bertholdsen*

Tá ið teir, sum sigla við Rasmus Effersøe einaferð verða troyttir av at sigla, er tað ikki vist, at teir kunnu velja sær fótbólt til nýggja vinnu.

Men at teir eisini eru stinnir at sparka, vístu teir til fulnar í ítróttarhøllini á Tvøroyri leygardagin.

Leygardagin varð skipað fyri innandura fótbóltskapping fyri fiskimenn í Suðuroynni og tá læt manningin á Rasmus Efferøe ongan iva vera um, hvørjir fiskimenn duga best at sparka.

Teir vunnu kappingina og fyri tað fingu teir heiðursmerki um hálsin og eitt stórt ferðasteyp, sum Føroya Banki hevði latið.

At fiskimenn hittast til fótbóltskapping innandura nú á nýggjárinum, hevur verið eitt vanligt sosialt tiltak norðanfjørðs í nøkur ár. Men í ár tóku so eisini suðuroyingar seg saman og skipaðu fyri eini kapping.

Hóast hugskotið kom knappliga og skotbráið tískil var stutt, høvdu 20 lið av 12 skipum meldað seg til kappingina. Sostatt høvdu fleiri skip manna tvey lið. Tað hevði Rasmus Effersøe eisini og teir, sum vunnu, vóru Rasmus 1. teir vunnu allar sínar dystir, uttan ein ímóti Niela Paula, sum endaði við javnleiki.



*Rasmus Effersøe vann innandurakappingina fyri fiskimenn í ítróttarhøllini á Tvøroyri leygardagin. Rasmus mannaði tvey lið. Teir sum vunnu, vóru Rasmus 1 og teir, sum mannaðu liðið eru: Aftara rað frá vinstru: Gudmund Nónstein og Óli Jensen úr Hvalba og Júst A Johannesen av Tvøroyri. Teir báðir sum húka eru, Jan Ole Farstad, liðskipari vinstrumegin og Jón Bogi Guttesen, báðir av Tvøroyri*

Men fyrireikararnir siga, at tað vóru nógvir, sum ikki vistu av kappingini, fyrrenn freistin at melda til var farin og kappingin varð løgd til rættis so at tað var ov seint at broyta hana.

– So høvdu vit havt stundir at lýsa kappingina betri, høvdu nógv fleiri lið melda til, siga fyrireikararnir.

Aftaná lokna kapping, fingu spælararnir døgverða, so teir fingu eisini eitt gott kvøld burturúr tí.

### Afturvendandi tiltak

Tiltakið var so væl eydnað, at teir ivast ikki í, at tað verður endurtikið næsta ár.

Tað, sum kanska kom mest óvart á, var, hvussu nógvir áskoðarar vóru í høllini allan dagin, kappingin vardi, nógv fleiri enn tað plaga at vera til vanligar ítróttarkappingar.

Fyrireikararnir siga, at næsta ár umhugsa teir at taka pening fyri atgongumerkini og at lata tað, sum kemur inn, fara til okkurt vælgerðandi endamál.

Hvør dystur vardi í fimm minuttir, men í finaluni varð spælt tvær ferðir fimm minuttir.

Í aðrari halvfinaluni vann Rasmus 1 heili 6-1 á Grana og í hinari vann Brestir 2-1 á Niels Paula eftir eitt gylt mál í longdari leiktíð, eftir at vanligi dysturin var endaður 1-1.

Í finaluni lótu teir á Rasmussi ongan iva ver um úrslitið, tí teir vunnu 3-0 á Bresti.

Dystin um 3. plássið vann Grani 4-3 á Niels Paula. Eisini hesin dysturin varð avgjørdur av einum gyltum máli í longdari leiktíð, eftir at vanligi dysturin var endaður 3-3.

Í kappingini fingu spælararnir seg royndar, tí teir, sum komu í finaluna, spældu ikki færri enn 10 dystir hendan dagin.

# Størsta fýrverk í landinum

**Nýggjársaftan fara tvøramenn at skjóta tað, sum teir siga verður størsta fýrverk í landinum í ár**

NÝGGJÁRSHALD
*Áki Bertholdsen*

Seinastu árini hevur Tvøroyri ment seg til at verða nýggjársbygd burturav. Og í ár ætla teir sær veruliga at liva upp til heitið at vera Føroya fremsta nýggjársbygd.

Tað eru eini 10 ár síðani, at tvøramenn tóku seg saman at skipa fyri einum veruligum bygdartiltaki nýggjársaftan og síðani er tað bara vaksið og vaksið. Og tað, teir fara at skjóta í ár, halda teir uppá, er størsta fýrverk í landinum.

Eini fýra kubikk av fýrverki verða skotin upp í loft á midnátt nýggjarsaftan og tað er meiri enn teir nakrantíð hava havt fyrr og tað er meiri enn nakar annar í Føroyum hevur, - siga fyrireikararnir.



*Fýra av oddamonnunum í gamlaársnevndini á Tvøroyri við hvør sínari bumbu, sum teir fara at skjóta upp í loft nýggjársaftan á Tvøroyri. Teir eru frá vinstru, Poul Leon Danielsen, Oddur Dimon, Signar Strøm og Hallur Strøm*

Ein av oddamonnunum í gamlaársnevndini á Tvøroyri, Oddur Dimon, sigur, at tað, teir hava keypt, er einans dygdarfýrverk og sjálvur hevur hann nakrar ferðir verið uttanlands á skeiði í at skjóta fýrverk.

Sum nakað serligt, hava teir eisini eitt ljósskelti, har tað stendur »Tvøroyri 2003« í ymsum litum.

Nýggjárshaldið á Tvøroyri byrjar í »Oldurdalinum« klokkan 23.45, tá ið skrúðgonga verður út í ítróttarhøllina, har stórt bál og fýrverk verður.

Aftaná verður farið innandura í ítróttarhøllina, har smurt breyð, sjampanja og sodavatn verður at fáa ókeypis.

Aftaná fer so »Ein Blanding« at spæla til dans, men dansurin kostar 120 krónur.



# Kirkjan á ótryggari grund

**Hans Jacob Joensen, bispur, heldur lítið um, at drotningin í framtíðini ikki skal tilnevna bisp ella hava nakað við eina yvirtikna kirkju at gera. Hann setir spurnartekn við, um heimastýrislógin hevur myndugleika til at taka heimildir frá drotningini, tí um Løgtingið skal kunna lóggeva á økinum, kann hann fara til songar sum lutherskur bispur og vakna sum katolikkur**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*



*Í Grundlógini stendur, at vit hava ta evangelisk-luthersku trúarjáttanina, men hvar verður hetta avgjørt at standa í framtíðini, og kann hetta broytast? Um avgerðin um trúarjáttanirnar skal standa í føroysku lógini, spyr bispur aftur, um hann í kvøld kann fara til songar sum lutherskur bispur og í morgin vakna og hoyra, at Løgtingið hevur avgjørt, at nú skulu vit verða katolikkar?*

Seinastu dagarnar hevur danska blaðið Kristeligt Dagblad vitjað í Føroyum, her tey hava prátað við ymisk fólk um ta ætlaðu yvirtøkuna av fólkakirkjuni. Teirra millum er Føroya bispur, Hans Jacob Joensen, sum í viðtali við danska blaðið 21. desember ikki leggur fingrarnar ímillum, tá talan er um yvirtøkuna av tí føroysku fólkakirkjuni.

Bispur er fyri, at Føroya kirkja skal gerast sjálvstøðug kirkja, men hetta merkir, at nógv umsitingarligt virksemi skal flytast úr Keypmannahavn til tað føroyska heimastýrið. Hann heldur, at tað eru fleiri mál, sum áttu at verið loyst, áðrenn føroyingar yvirtaka kirkjuna.

Tað, sum serliga órógvar bisp, er komandi støðan hjá drotningini til ta føroysku kirkjuna. Sambært ætlanunum hjá Mentamálaráðnum og danska kirkjumálaráðnum skal hon í framtíðini ikki longur útnevna bispin í Føroyum, sum hon t.d. ger tað hjá grønlendingum, sum hava yvirtikið sína kirkju.

Bispur ger vart við, at eins og tey flestu eru ivasom um støðuna hjá drotningini í framtíðini, er eisini ivasamt um ein yvirtikin føroysk fólkakirkja framvegis er umfatað av Grundlógini, og harvið stuðlað av danska statinum, tvs. um ein føroyskur »statur« í framtíðini eisini yvirtekur skyldurnar, danski staturin hevur í dag. Grundlógin gevur kongi ymiskar heimildir í kirkjuni, og spurningurin, um hesar heimildir kunnu fella burtur, sjálvt um kirkjan verður yvirtikin eftir heimastýrislógini, er enn ógreiður. Tí heldur Hans Jacob Joensen sambært Kristeligt Dagblad tað ikki vera nóg mikið við eini avtalu millum danska kirkjumálaráðið og føroyskar embætismenn, tá talan er um taka heimildir frá drotningini.

### Kann vakna á morgni sum katolikkur

Hans Jacob Joensen heldur fram við at vísa á, at tá talan er um føroysku kirkjuna, er tað talan um ta luthersku kirkjuna, sum eisini er tann danska fólkakirkjan, og tí eru trúarjáttanirnar hjá tí føroysku og donsku kirkjuni tær somu. - Men verða trúarjáttanirnar av sær sjálvum fluttar yvir til ta føroysku kirkjuna, um vit loysa hana frá donsku grundlógini, spyr bispur.

Í Grundlógini stendur nevniliga, at vit hava ta evangelisk-luthersku trúarjáttanina, men hvar verður hetta avgjørt at standa í framtíðini, og kann hetta broytast? Um avgerðin um trúarjáttanirnar skal standa í føroysku lógini, spyr bispur aftur, um hann í kvøld kann fara til songar sum lutherskur bispur og í morgin vakna og hoyra, at Løgtingið hevur avgjørt, at nú skulu vit verða katolikkar? – Um samband ikki longur er millum kirkjurnar báðar gjøgnum Grundlógina, er trygd ikki longur fyri, at føroyska kirkjan er evangelisk-luthersk. Ein slík trúarjáttan eigur at vera ávíst í eini lóg, eini føroyskari grundlóg, sum ikki kann broytast av politikarum, men bert við fólkatkvøðu. Tí skal føroyska fólkið eisini atkvøða um yvirtøkuna av suverenitetinum, sigur Hans Jacob Joensen, bispur.

### Munur á Nyrup og Fogh

Hann heldur, at danska stjórnin í dag markant hevur broytt signalini, tá talan er um føroysk viðurskifti.

Kristeligt Dagblad skrivar, at vóru trupulleikar millum Landsstýrið og ta donsku stjórnina, meðan Poul Nyrup Rasmussen var forsætismálaráðharri, so er ikki vist, at trupulleikarnir eru minni, nú Anders Fogh Rasmussen vísir ynskjunum føroyskt sjálvstýri betri viðferð. Sami grundhugburður gongur kanska aftur í danska kirkjumálaráðnum, sum vísir ætlanum um yvirtøkuni vælvild. Hetta undrar føroyingar bæði í tí politiska og kirkjuliga umhvørvinum eins og restina av fólkinum. Onkur heldur, at hetta fer at hava øvugt árin, nevniliga, at føroyingar verða skeptiskir, og lata vera við at yvirtaka.

Til hetta sigur Føroya bispur, at tað er ein markant broyting og løgin kensla, at vit bara kunnu gera, sum okkum lystir. - Tað er í ein ávísan mun í lagi, men mær vantar enn, at ein loysing ella einar sjálvstøðugar Føroyar verða samtyktar av tí føroyska fólkinum. Tað er ein merkiligur vegur at ganga bara at sleppa øllum. Undir Nyrup fingu vit at vita, at alt ikki bara kundi flytast úr Danmark til eina sjálvstøðuga føroyska kirkju. Í dag fáa vit so at vita, at tað eru als eingir trupulleikar. Heldur ikki við Grundlógini. Tann dag, tá alt á henda hátt er yvirført til Føroyar sjálvar, hvat skal Føroya fólk tá svara á eini fólkaatkvøðu? Hvat hendir, um Føroya fólk sigur nei? Tað er føroyska fólkið, og ikki teir føroysku politikararnir, sum skulu avgera fullveldisspurningin. Tí er tað einasta rætta at halda eina fólkaatkvøðu um føroyskt fullveldi, sigur Hans Jacob Joensen.

### Yvirtøkan av kirkjuni avgerandi fyri alt sjálvstýrismálið

Bispur sigur seg ynskja, at ein breitt samansett nevnd skal gjøgnumganga ta føroysku kirkjulóggávuna fyri koma fram júst hagar, suveréniteturin skal galda, og har hann ikki skal galda. Sum nevnt hevur danska blaðið prátað við fleiri fólk í Føroyum um ta ætlaðu yvirtøkuna av kirkjuni teirra millum er stjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen, sum eisini úttalar seg týdningin av kirkjumálinum. Í blaðnum 18. desember sigur hann: - Hvis ikke det skulle lykkes i denne omgang at få folkekirken under færøsk selvbestemmelse i forhold til den danske folkekirke, så tror jeg, at yderligere overgang til selvstændighed på Færøerne kan få det svært i de kommende år.